# Posta Stamps
Føroyar

Nr. 29
September 2016

ISSN 1603-0036




- Føroyska provisoriumerkið 20/15 frá 1940
- Postgjaldsmerkini 2016
- Toskaskræðufrímerki
- Jólavørur

Posta
FAROE ISLANDS







**Mynd nr. 1**
Provisoriufrímerki við 20-tali uttan bjálka og veikum, ikki dekkandi, yvirprenti. Merkið stavar frá royndarprentinum, men varð seinni selt sum frímerki og nýtt postalt í Klaksvík.

**Mynd nr. 2**
Provisoriumerki við 20-tali uttan bjálka, við dupultprenti av einum ikki heilt dekkandi yvirprenti. Merkið stavar frá royndarprentinum, men er seinni selt sum frímerki og nýtt postalt í Tórshavn

**Mynd nr. 2a**
Umvaksin mynd av nr. 2

# Føroyska provisoriufrímerkið 20/15 oyru frá 1940

2. november 1940, fyri 75 árum síðani, gav Føroyar út eitt bráðfeingisfrímerki, tað sokallaða 20/15 oyru provisoriumerkið. Frímerkið gjørdist tað fyrsta í einari røð av fimm, har trý av postvirðunum vórðu givin út við tveimum ymiskum yvirprentum.

Posta hátíðarhelt 75 ára dagin við útgávuni av fýra postgjaldsmerkjum í oktober 2015. Eitt teirra avmyndar 20/15 provisoriu-frímerkið.

Føroysku bráðfeingisfrímerkini og søga teirra er nágreiniliga granskað og lýst í einari røð av greinum. Eg haldi tó, at greinarøðin um Føroyar og filateli í "Frimærkesamleren," eigur at halda dagin við at geva eina stutta dagførda lýsing av, hvussu hesi frímerki vórðu til og hvussu tey vórðu nýtt.

## Støðan í 1940

Um vit líta aftur til 1940, kom Danska kongaríkið (Danmark, Føroyar, Ísland og Grønland) í eina trupla støðu, tá Týskland hersetti Danmark og Noreg tann 9. apríl.

Skandinaviski vøruflutningurin til Onglands, sum um hetta mundið stóð einsamalt í stríðnum móti Týsklandi, steðgaði – og bretar vóru nú bundnir av vøruveitingum úr Kanada og USA. Hetta kravdi at sjóleiðin var opin og so trygg sum yvirhøvur tilbar.

Týskarar høvdu marsjerað inn í Danmark uttan stórvegis mótstøðu og tryggjað sær undirtøku til liðsavning av hermonnum, arbeiðsmegi o.s.fr. Teir fingu eisini atgongd til eitt vælútgjørt spískamar og ynsktu, at "hertøkan" skuldi tykjast sum okkurt slag av samgongu. Týskarar loyvdu postflutningi úr Danmark undir krígnum, og sambandið var bara kvett í fáum stuttum førum.

Ongland kvetti postsambandið við Danmark og hertók Føroyar og Ísland, fyri at tryggja sær at týskurin ikki tók tey eisini. Bretar mettu Danmark sum eitt týsktvinarligt land.

Ongland hevði eisini, hóast amerikanskan mótvilja, sent hermenn til Grønlands, men noyddist at góðtaka, at Grønland kom undir amerikanska verju.


Udskrift af Skrivelse:
Thorshavn Postkontor den 14. Oktober 1941.
J. Nr. 284.

Til
Generaldirektoratet for Post- og Telegrafvæsenet.

..............................................................
..............................................................
N.B. Af de pr. 2. November 1940 overtrykte 1401 Ark 15 Øres Frimærker til 20 Øre var 2 Ark Prøvetryk, kun paatrykt med Tallet 20 og uden den horisontale Streg – under Tallet 20. Disse 2 Ark Prøvetryk var henlagt separat i Beholdningen af Frimærker. Under undertegnede Postmesters Sygdom i Maj Maaned 1941 (Operation for [illegible]), hvor Frimærkesituationen var meget kritisk, og hvor saa godt som hele Beholdningen af 20 Øres Frimærker blev opbrugt, er disse 2 Ark Prøvetryk 20 Øre paa 15 Øre ved et Uheld, som ikke kan beklages nok, sammenblandet med de andre Frimærkeark og solgt til Publikum.

J. Danielsen (sign).

Udskriftens rigtighed bekræftes.
Thorshavn postkontor, den 23. maj 1949.

**Mynd nr. 1a.**
*Bræv frá J. Danielsen postmeistara, ið ger vart við, at nøgdin av 20 oyru frímerkjum, sum um hesa tíðina var 20/15 provisoriumerkið frá 17. mars, er við at verða uppi. 2. mai varð eitt nýtt provisoriumerkið 20/1 givið út.*

*Tann ið keypti tey 2 royndarprentini, brúkti tey til frímerking, saman við 20/1 provisoriumerkinum við høgum yvirprenti, tá hann varnaðist at bæði ørkini vóru óvanlig.*

**Støðan í Føroyum í 1940**
Sambandið til Danmarkar varð kvett, og trupulleikar, ið stungu seg upp, skuldi nú loysast í Føroyum. Í fleiri av førunum skuldu loysnirnar góðtakast av bretum.

Føroyingar høvdu fyrireika seg upp á at kríggj fór at bresta á í Evropa – og høvdu tryggja sær fleiri neyðsynjarvørur og eina størri frímerkjagoymslu enn vanligt. Mett varð at goymslurnar skuldu halda, tað ið eftir var av árinum.

Bretar noktaðu føroyskum skipum at føra danskt flagg, og føroyingar valdu tí at sigla undir egnum flaggi. Føroyskir fiskimenn í hópatali luttóku í krígnum við at sigla fisk til Onglands. Hetta var vandamikið arbeiði, orsakað av týskum kavbátum, og førdi til miklan miss av skipum og mannalívi.

Tá hertøkan varð veruleiki, vórðu nýggj frímerki bíløgd úr Danmark, umvegis bretar. Avtalað varð at frímerkini skuldu fáast til vega umvegis skrivstovuna hjá altjóða postfelagnum í Bern. Amtmaður og løgting valdu at fylgja donsku postgjaldshækkingini frá 1. juli 1940, við gildi frá 10. juli, har m.a. landspostgjaldið hækkaði frá 15 til 20 oyru. Í oktober 1940 vóru bíløgdu frímerkini enn ikki komin til Føroya og trot var við at taka seg upp. Føroyingar ynsktu, at so leingi sum til bar, skuldu brøv frankerast við donskum frímerkjum, ið gjørdu vart við samleikan við Danmark. Aðrir kostir vóru at nýta postgjaldsstempul ella brúka ensk frímerki.

**Royndarprent av 20/15 provisoriunum**
Endaliga loysnin var, sum í 1919, at framleiða eitt bráðfeingis frímerki við at yvirprenta avlopsfrímerki við virðinum 15 til 20 oyru. Í 1919 varð avgerðin tikin í Keypmannahavn, men hesa ferð vóru tað føroyingar sjálvir ið avgjørdu málið.

Tað varð H. N. Jacobsens boghandel og bogtrykkeri í Tórshavn, ið fekk til uppgávu at framleiða eitt royndarprent av einum 20 oyra provisoriu. Eitt "20" tal skuldi prentast omaná 15-talið á hvørt av teimum 100 frímerkjunum í hvørjum arki.

Prentplátan varð framleidd við handsettum prentlutum, har 100 leys tveytøl, 100 leys null og blindfylla vóru nýtt.






**Mynd nr. 2a**
Umvaksin mynd av nr. 2

**Mynd nr. 3**
Provisoriumerki við 20-tali uttan bjálka, við dupultprenti av einum ikki heilt dekkandi yvirprenti. Merkið er við frábrigdinum "Springari í neti", merki nr. 55 í øðrum hvørjum arki. Tey bæði royndarprentini eru frá hvør sínum sylindara og hetta frábrigdið kemur bara eina ferð fyri á hesum yvirprentinum.




**Mynd nr. 4** Hornamarginalblokkur av fyrra prenti við veikt dekkandi yvirprenti, og frábrigdi í 19. merki, har bjálkin er forskotin til høgru. Yvirprentið stendur ikki áraka undirtromina á 1-talinum og fóturin á 2-talinum er forskotin 4 rastir til vinstru.

Fyrsta royndarprentið miseydnaðist. Liturin var ov bleikur og dekkaði ikki nóg væl.

15 oyru karavellmerkið, ið skuldi yvirprentast, er framleitt sum stálstunga, har liturin liggur sum ein harður ryggur á pappírinum, og uppbygdur av smáum rastum. Yvirprentið "20" skuldi prentast undir hørðum trýsti fyri at røkka inn á hvíta botnin í rastunum, so prentið gjørdist reint og svart.

Prentsmiðjan avgjørdi at framleiða enn eitt royndarprent, áðrenn ørkini vóru løgd fram til góðkenningar.

Mett var, at yvirprentið var ov lítið – og at tað skuldi gerast størri við at seta ein "bjálka" undir 20 talið.

Samanlagt vóru 200 frímerki yvirprentað við "20" uttan bjálka. Hesi vóru royndarprent, skuldu leggjast til viks og goymast og bara brúkast av neyð, um frímerkjatrot skuldi koma fyri aftur.

Royndarprentini vórðu seinni "av misgávum" seld yvir diskin sum frímerki, og vórðu nýtt á brævbjálvum sum gjaldgongd frímerki. (Mynd nr. 1a, bræv dagfest 14. oktobur 1941 frá J. Danielsen postmeistara)

**Hesi merki finnast:**
* Merki við veikum ikki dekkandi yvirprenti.

Mynd nr. 1.
* Merki við sterkum, partvís dekkandi prenti.
* Merki við sjónligum dupultum yvirprenti. Eitt av ørkunum varð yvirprentað 2 ferð, og á hesum arkinum sæst eitt týðiligt dupult yvirprent í støðum. Mynd nr. 2 og 2a.
* Frábrigdi við lýti í grundmerkjunum av teimum báðum prentsylindarunum. "Dupult trýstmerki í flaggi" og "springari í neti." Mynd nr. 3 og 3a.
* Tey frábrigdi, ið finnast í 2-talinum og nullinum, eru tey somu, ið eru kend frá endaligu útgávunum.

**20/15 oyru provisoriufrímerkið – fyrra prent:**

Restin av frímerkjunum, ið skuldu yvirprentast, vóru 1.399 ørk av 15 oyru reyð karavell, snið II, marginalnummar 385.

Ein "bjálki" varð settur undir 20 talið, og prentingin av teimum 1.399 ørkunum fór í gongd.
Ein partur av ørkunum í hesum fyrra prentinum hava "veikt, ikki dekkandi" til "sterkt, næstan dekkandi" yvirprent. At nøkur ørk við veikum prenti vóru framleidd, kann koma av




**Mynd nr. 5**
Ovari vinstri hornamarginalblokkurin av fyrra prenti. 1-talið er ikki yvirprentað, av tí at vatnrætta yvirprentið var smalari enn frástøðan millum tey 10 15-tølini. Í 2. merki liggur bjálkin beint undir 20-talinum.




**Mynd nr. 6**
Trístrípa av seinna prenti við heildekkandi svørtum yvirprenti. Á merkinum til vinstru stendur fóturin á 2-talinum áraka bulin á 1-talinum. Á hinum báðum merkjunum sæst, at frástøðan millum 20-tølini er minni enn frástøðan millum 15-tølini. Merkini eru nummar 14 – 16 í arkinum, við skurslaðum bjálka í 16. merki.




**Mynd nr. 7**
Par av seinna prenti við fult dekkandi svørtum yvirprenti. Frástøðan millum 20 -tølini er størri enn frástøðan millum 15-tølini. Høgra merki hevur stuttan bjálka, nr. 78 í arkinum, og í hesari loddrættu strípuni er frástøðan økt samanborið við fyrra prent.

at maskintrýstið ikki varð sett upp, eftir at teir eyka 100 "bjálkarnir" vóru settir inn.

Tá eftirkannað varð, kundi staðfestast at:
* Yvirprentið framvegis ikki dekkaði fult. Mynd nr. 4. Á fleiri av ørkunum var 1-talið í 15 ikki yvirprentað, tí at yvirprentið var ov smalt. Mynd nr. 5. Frástøðan millum tey einstøku 20-tølini vísti seg at vera minni enn frástøðan millum 15-tølini á grundmerkjunum, burtursæð frá tí loddrættu røðini millum 3. og 4. merki.
* Í 19. merki var bjálkin settur rættuliga skeivur undir 20-talið. Mynd nr. 4.
* Fleiri ørk høvdu ligið eitt sindur skeivt undir prentingini.

Prentplátan varð rættað til, har fleiri av frábrigdunum hvurvu, men einstøk nýggj komu í staðin.

**20/15 oyru provisoriufrímerki - seinna prent:**
Millum annað vóru hesar broytingar framdar í yvirprentinum:

* Yvirprentið varð víðkað í breidd við "bara" at leggja millumstykki (sum blindfyllu) í 2 lodrættar raðir, eitt smalt millum 3. og 4. røð og eitt breiðari millum 7. og 8. røð. Í hesum pørunum verður yvirprentið nú breiðari enn frástøðan millum tey bæði 15-tølini á grundmerkinum. Mynd nr. 6, 7 og 10.
* Áprentið verður nú framt undir enn størri trýsti, og úrslitið er eitt snøgt heildekkandi svart yvirprent. Mynd nr. 8 og 10.
* Skeivleikin í 19. merki verður rættaður. Mynd nr. 8.
* Ein nýggjur skeivleiki kemur fyri í 2. merki, tí bjálkin hevur flutt seg til vinstru. Mynd nr. 9
* Tað er eyðsýnt at man ger sær størri ómak at fáa ørkini at liggja rætt áðrenn yvirprentað verður, og á flestu merkjunum liggur bjálkin nú ájavnt við undirtromina á 15-talinum.
* Fleiri bjálkar verða rættaðir til.

Innskrivað bræv sent sum radioheilsan til bretska konsulin í Tórshavn, frímerkt við einum pari av 20/15 og tveimum 5 oyra frímerkjum. Sum sæst, er frástøðan millum 20-tølini størri enn millum 15-tølini á grundmerkjunum, (mátað til 21 mm). Høgra merki hevur stuttan bjálka. Tað er nr. 78 í arkinum, sum eisini hevur skrátt avskornan bjálka yvir th. Merkini eru nummar 77 og 78 í arkinum,




**Mynd nr. 8**
Hornamarginalblokkur av seinna prenti, har feilurin í 19. merki er rættaður í mun til fyrra prent.



**Mynd nr. 9**
Ovasta horn av seinna prenti, har eitt nýtt frábrigdi er íkomið í 2. merki, har bjálkin er forskotin vinstrumegin 20-talið.



**Mynd 10a**
Vaksin mynd av nr. 10

og tað samsvarar við seinna prent, har frástøðan millum 20-tølini er økt. Yvirprentið er somuleiðis sterkt heildekkandi svart, samsvarandi seinna prenti. Á merkinum til vinstru fer fóturin á tvey-talinum tríggjar rastur út yvir eitt-talið á grundmerkinum – og á hinum røkkur tað bara tvær rastur út yvir eitt-talið. Frástøðan millum tvey-tølini er her soleiðis størri enn millum eitt-tølini á grundmerkjunum. Mynd nr. 10, 10a og 7.

Vit hava her víst á nøkur av teimum sjónligu eyðkennum á fyrra og seinna prenti, men tað finnast nógv fleiri.

Ongin kennir rætta upplag av fyrra og seinna prenti, og tað ber ikki til hjá mær at meta um býtið, grundað á tað heldur avmarkaða tilfarið, eg havi havt til taks. So vit fáa at síggja hvat kemur undan kavi, og hvat vit so hvør sær hava ilt við at finna.

20/15 frímerkini vóru útseld á posthúsinum í Tórshavn tann 6. februar 1941, og á teimum smærri brævastøðunum í mars mánaði. Síðan vórðu 20 oyru frímerkini, sum nú vóru komin úr Danmark, tikin í nýtslu.

Takk til Poul Erik Malmbæk fyri holla og nágreiniliga ráðgeving vm.




**Mynd nr. 10**
Bræv við pari av 20/15 við breiðum yvirprenti millum 20-tølini. Merkini eru nr. 77 og 78 í arkinum við stuttum, skeivum bjálka í nr. 78. Sí samsvarandi í mynd nr. 7.

*Flemming Petersen (Greinin stóð upprunaliga í "Frimærkesamleren" nr. 5 , 2015)*

# Postgjaldsmerkini 2016

## Tónleikafestivalar í Føroyum







Postgjaldsmerkini í ár vísa føroyskar tónleika-festivalar.

Tey fýra postgjaldsmerkini vísa ávíkavist G! festivalin, Summarfestivalin, Sørvágs Country- og Bluesfestival og Voxbotn.

Tónleikur hevur altíð fylt nógv í føroyskari søgu og mentan og hava Føroyar í dag eitt ríkt tónleikalív innan flest allar tónleikagreinar.

Vit hava bæði sangarar og tónleikarar, sum syngja og framføra í heimsklassa. Teir mongu tónleikafestivalarnar seta sín serstaka dám á føroyska summarið.




# Skræða á frímerkjum - fyri fyrstu ferð nakrantíð!

26. september 2016 gav Posta út eitt heilt serligt frímerkið við toskaskræðu.

Á frímerkinum heiðra vit toskin, *Gadus Morhua*. Á hvørjum frímerki er eitt petti av toskaskræðu límað á, og er hetta ein stór sensatión í frímerkjahøpi. Onki frímerki er heilt eins, tí skræðan er unik.

FØROYAR
TORSK
GADUS MORHUA

Teksturin á skræðuni er ein endurgeving av einum gomlum teksti, sum fyrr stóð á tunnunum við toski til útflutnings. Tað er gjørt reytt fyri at gera frímerkið vakrari.

Frímerkið hevur áljóðandi virði av 50,00 kr. og heilarkið hevur seks frímerki.

Tú kanst lesa meira um hesa sermerktu frímerkjaútgávu á heimasíðuni ella í Posta Stamps nr. 28






# Mappa: Toskaskræða




Ein snotilig mappa av útgávuni er eisni gjørd. Í mappuni er frímerkið og fyrstadagsbjálvin umframt enskur tekstur um útgávuna. Mappan er tal-merkt og signerað av Martin Mörck.

Bílegg hesar vørur á heimasíðuni www.stamps.fo ella við at senda inn bíleggingarlepan inni í blaðnum.

**135 DKK**




99 DKK




30 DKK



25 DKK settið

# Jólavørur 2016

**Jólaprýði**

Sum siður hevur verið seinastu árini, so gevur Posta út eitthvørt prýði til jóla. Í ár hava vit so aftur valt at lata tríggjar føroyskar kirkjur mynda jólaprýðið.

Sum undanfarin ár er tað listamaðurin Janus D. Guttesen, sum hevur sniðgivið jólaprýðið.

Tær tríggjar kirkjurnar eru Mariakirkjan í Tórshavn (1987), kirkjan í Saksun (1858) umframt kirkjan í Gøtu (1995).

Jólaprýðið er úr messingi og lagt við gulli. Gyltur snórur er festur í prýðið, so klárt er at heingja upp. Tey eru uml. 8,5 cm til støddar, og verða seld í vakrari eskju - trý í hvørjari.

**Jólaprýðið kostar 99 kr. settið**

**Jólakúlur**

Vøkru tekningarnar hjá Edward Fuglø um jólaevangeliið prýða vøkru jólakúlurnar, sum kunnu heingjast á jólatræið.

**Jólakúlur, 6 stk.: 149 kr. settið**

**Jólamerki**

Barnatekningar prýða jólamerkini 2016. Posta skipaði fyri teknikapping millum føroysk børn og tær 15 vinnandi tekningarnar koma út sum jólamerki. Arkið hevur eisini skift format og merkini eru fyri fyrstu ferð sjálvklistrandi.

Avlopið av søluni fer til Jólamerkjagrunnin, ið hevur til endamáls at stuðla tiltøkum fyri børn og ung í Føroyum.

**Jólamerkjaarkið kostar 30,00 kr.**










## Jólakort

Fimatan einkult jólakort við myndevnum úr jólamerkjaarkinum fáast eisini til keyps. Jólakortini verða seld sum sett við fimm kortum í hvørjum setti.

**Jólakortini kosta 25,00 kr. settið.**

## Ársmappa

Kundi tú hugsað tær at keypt øll ársins frímerki skjótt og ómakaleyst? So er hetta loysnin. Í ársmappuni eru øll frímerki og smáørk, ið eru givin út í ár. Mappan verður seld fyri áljóðandi virði.

**Ársmappan kostar 395,00 kr.**

## Árbók

Árbókin savnar allar ársins frímerkjaútgávur og saman við frímerkjunum fært tú áhugaverdu søguna aftanfyri hvørja útgávu lýsta við greinum og vøkrum myndum.

Tekstirnir í hesi snøggu bók eru á donskum, týskum og enskum og hóskar bókin seg tí sera væl sum gáva til vinir og kenningar uttanlands.

Frímerki og smáørk eru sett í lummar í árbókini.

**Árbókin kostar 425,00 kr.**

# Nýggjar útgávur - 7. november 2016




Nýggj útgáva: **Árbók 2016**
Útgávudagur: 07.11.2016
Virði: 425,00 kr.
Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark




Nýggj útgáva: **Ársmappa 2016**
Útgávudagur: 07.11.2016
Virði: 395,00 kr.
Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark




Nýggj útgáva: **Jólamerkini 2016**
Útgávudagur: 07.11.2016
Virði: 30,00 kr.
Listafólk: Barnatekningar
Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark

Snið og uppsetan: Posta Stamps. Framsíðumynd: Toskaskræðufrímerkini. Prentsmiðja: Trykteam, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

/faroestamps